# Hjørdis og hennara burturflutta omma

**Tann 92 ára gamla Hjørdis Háberg hevur eina spennandi ættarsøgu, sum eisini gongur aftur til Blankaskála og Syðradals á Kallsoynni**

Hon er ættað úr Suður í Stovu ella Kongsstovu, sum var festigarðurin á Blankaskála.

Festarin í 1686 kallast Poul Joensen.

Pápi Poul var Jógvan Joensen, sýslumaður, úr Syðrugøtu, sum helst er giftur við dóttir Hanus í Gerðum, sum saman við svágrinum Dánial presti við jarðarkeypi í 1686 høvdu tryggjað sær ræðið yvir bygdini.

Pápi Jógvan Joensen hevur helst verið Joen Poulsen Øre, løgmaður, og man han vera føddur tíðliga í 17 øld. Hann var løgmaður í árunum 1662-77. Hann er forrestin forfaðir til Edmund Joensen.

Sagt varð um nýggja festaran Poul, at hann var belestur, sum tað skilst á skiftinum, og tað sigur okkum nakað um hvørjum fólki, hann var av.

Poul doyði í 1723. Kona hansara kallaðist Cathrina Simonsdatter. Tey fingu fimm lívsarvingar.

Tann elsti av teimum æt Jógvan Poulsen f. 1689, sum var giftur við Onnu Haraldsdatter í Oyndarfirði.

Jógvan Poulsen gifti seg til eitt festi í Oyndarfirði, sum hann hevði árini 1718-1724, tá hann flutti aftur til Blankaskála, har hann tók við ættarfestinum. Tá flutti beiggin Dánjal til Oyndarfjarðar, har hann tók við festinum har.

Í Kallsoynni er framvegis ein "Oyndraskorð", sum fekk navnið, frá tí hon varð røkt úr Oyndarfirði.

Triði sonur Poul var Jákup f. 1696, sum var pápi til Hans Jacobsen Debes, sum gjørdist løgmaður á Steig.

Fjórði sonurin var Símun Poulsen f. 1695, sum giftist inn í Miðstovuna, og hvørs ætt hevur verið umrødd.

Hanus Simonsen giftist vestur í Vágar, hagar hann upprunaliga fór at tæna hjá systkinabarni sínum, løgmanni. Hann gjørdist ættarfaðir til m.a. Simonsen ættina, sum eisini gjørdist stór m.a. í Fuglafirði, og er borgmeistarin Sigurð Simonsen ættaður frá Hanusi.

## Ættin hjá Peturi

Áðrenn farið verður víðari við Hjørdis, skal verða greitt frá, hvussu Petur Háberg, maður hennara, kemur inn



*Hjørdis situr á kistuni, som omman hevði við sær, tá hon var burturflutt*



*Kistan innan. Í henni eru troyggjur, sum Hjørdis hevur bundið til børn í Rumenia*

í myndina. Petur var sonur Napoleon Joensen, f. 1878, Pola skómakaran, sum var av Selatrað. Hann var sonur Elias Fr. Joensen, f. 1844, sum var ættaður av Trøllanesi. Pápi hansara var Joen Johannesen f. 1793, vanliga nevndur Fuglafjarða Jógvan. Mamma Jógvan var Anna Olesdatter f. 1751, ættað úr Tjørnustovu í Norðragøtu. Hon var dóttir Ole Jacobsen, f. 1715 og Cathrine Simonsdatter f. 1723, sum var ættað av Blankskála.

Hon var dóttir umrødda Simon Poulsen, og tískil var abbi hennara fyrstnevndi Pól Joensen, sum sostatt er felags forfaðir hjá teimum báðum, Petur og Hjørdis.

## Ikki blídligur men hegnigur

Sagt verður, at Jógvan, sonur Poul, og Anna vóru múgvandi fólk. Har skortaði hvørki pengar ella jørð ella skart, og sjálvi áttu tey prýðilig hús. Smiður hevur Jógvan eisini verið, og skiftið nevnir m.a. langsag, langhøvil og høggujørn.

Jógvan Poulsen er umrøddur í søgnini um Uppsala Pætur og sagdur "ikki at vera blídligur maður". Tað sama kann tó ikki sigast um eftirkomararnar.

Ein sonur Jógvan Poulsen kallaðist Jógvan Joensen. Hann giftist í 1750 við Elsebeth Olufdatter á Toftanesi í Lorvík. Men hann doyði ungur og festi ongantíð. Tey áttu eina dóttir, Anna Margretha Joensdatter f. 1753. Hon giftist í 1773 við Klæmint Simonsen úr Yviristovu í Svínoy, og fekk hann festið um somu tíð.

Hann var annars bátsformaður á bátinum av Blankaskála feigdartúrin í 1803, sum varð umrøddur í frásøgnini um Blankskálabátin, tá beiggjarnir Símun og Poul Poulsen, abbasynir fyrsta Simon Poulsen, doyðu av overving.

Elsti sonur Klæmint og Onnu Margrethu var nevndi Joen Clementsen, sum var 24 ár í 1801. Hann giftist í 1804 við Malenu Jensdatter og fekk festið í 1807. Malena var einkja. Hon var fyrst gift við Garðs-Dániali á Viðareiði, sum gekk burtur við Fodlindsbátinum í 1802, tá 5 av 8 monnum umkomust.

## Brúðurin sum var stjolin

Tá ið fólkið á Blankaskáli flutti til Syðradals eftir skarvalopið, fingu tey almennan studning, sum hjá Jógvan var kr. 502. Húsini hjá teimum vóru liðug í 1812, og Løbner amtmaður kom persónliga til Syðradals at sýna. Men her var eingin trupulleiki. Ummælið, hann fekk frá amtmanninum, var "Joen Clementsen, velhavende Mand---."

Tey bæði áttu m.o. børn sonin Dánjal f. 1814. Hann giftist í 1834 við Jóhonnu Olesdatter úr Norðristovu í Gerðum. Tey búsettust á Syðradali, og eru hetta sjeyndu húsini í bygdini, og tey róptu tað "har Úti".

Dánial og Johanna áttu sjey børn. Triðelst var Catrine Sofie Joensen f. 1840, sum í 1862 giftist við Jørgen Davidsen av Nesi í Eysturoynni. Tey fingu 11 børn, og er hetta stórur partur av orsøkini til, at Hjørdis hevur átt ikki færri enn 99 systkinabørn.

Hetta giftarmálið gjørdist kent í eftirtíðini fyri brúðrina, sum varð "stjolin" út á Nes.

Hjørdis eigur eitt ítøkiligt minni um hesa hending, nevniliga kistuna sum omma Hjørdis hevði við sær, tá hon varð "burturflutt".

Eitt av teimum 11 børnunum hjá Jørgen og Katrinu Sofíu var Jógvan, pápi Hjørdis, sum fekk sær navnið Næsaa.

Jógvans navnið er framvegis í ættini. Ein sonur Hjørdis eitur Jógvan (Páll), og hann eigur aftur





*Jørgen og Johanna Sofía. Tað var ikki bara sum at siga tað hjá teimum báðum at koma saman*

ein abbason, sum eitur Jógvan. Vit kunnu rokna okkum fram til, at Jógvans navnið gongur í hvussu er aftur til fyrst í 17. øld, ella 400 ár aftur. Verður lív og heilsa, verður Jógvans navnið tryggjað í ættina væl inn í 5.øld!

## Søgan um "brúðarránið" og kistuna av Blankaskála

*Hjørdis greiðir frá:*
Omma æt Katrina Sofía og var norðan av Syðradali. Foreldur hennara vóru av Blankaskála. Tey fluttu til Syðradals, tá tað var omanlop á Blankaskála, og har hevur eingin búð síðan. Hon var bóndadóttir, og abbi var bara vanligur fiskimaður, so foreldur hennara vildu ikki, at hon skuldi giftast við honum. Abbi hevði tríggjar systrar, sum vóru giftar har norðuri á Kallsoynni, og var hann ofta har norðuri og vitjaði systrarnar. So onkuntíð tá hann hevði verið har norðuri, høvdu tey nokk avtalað, nær hann skuldi koma eftir henni.

Hann fór so við róðrarbáti eina nátt norður. Hon tænti tá hjá prestinum á Viðareiði, so hann mátti heilt norður til Viðareiðis eftir henni. Onkur vildi vera við, at prestur hjálpti henni, so har stóð hon klár á lendingini við eini kistu, har hon hevði øll síni ting í.

## Kistan

Eg minnist, at kistan stóð uppi á loftinum hjá okkum har heima í Magnus Heinasonargøtu. Tá var hon brún. Pápi mín hevði hana við klæðum, tá hann fór til skips. Inni í lokinum stóð eitt árstal skrivað. Eg haldi, at tað var 1784, men tað er tíverri málað útyvir tað. Nú stendur henda góða kistan í kamarinum hjá mær á Ellisheiminum og er málað blá.

Jørgen og Katrina Sofía giftust so í Nes kirkju 22. juli 1862. Hann var 21 ára gamal, og hon var 22 ár. Tey hildu stórt brúdleyp, men á Syðradali vóru tey so ill, at eingin vildi koma í brúdleypið. Men tað rættaðist eftirhondini. Eg haldi, at okkurt av børnunum blivu uppvaksin har norðuri. Tey fingu eisini heili 11 børn.

## Jørgen var ein knassi

Abbi misti pápa sín, tá hann var 14 ára gamal. Hann var einasti sonur og mátti tí sum hálvaksin drongur taka við sum húsfaðir.

Sum 17 ára gamal var hann við á eini vandaferð eftir lækna suðuri í Havn. Dóttir Pryde prest var vorðin sjúk, og menn vóru bidnir um at fara eftir lækna. Veðurlíkindini høvdu ikki verið góð henda morgun 26. september 1857, men stórur bátur við 8 monnum fór av Nesi til Havnar. Læknan fingu teir í øllum góðum umborð, men á heimferðini umkomust seks mans. Ein genta á landi sá tilburðin. Ov lítið av fólki var eftir á Nesi, so tað mátti sendast boð út á Toftir. Men tá toftamenn komu á staðið, sótu bert tríggir mans eftir á kjøli og vórðu teir læknin, abbi og ein, sum æt Justines. Teir vórðu so bjargaðir.

Abbi, sum dugdi væl at svimja, hevði hjálpt hinum báðum uppá kjøl. Lærarin á Argjum, Olaf Petersen, hevur skrivað um Jørgen á Nesi, at hann var í seinnu helvt av 19. øld ein vælkendur maður. Hann var sera dugnaligur útróðrarmaður, men hann var tiltikin at leggja nógv fyri.

Á vári 1911 fór hann til Havnar. Tey vóru fleiri, og eisini tvey abbabørn vóru við. Men tá tey komu aftur, kollsigldi báturin út fyri Hvítanes. Abbi og bæði abbabørnini druknaðu. Tá var hann 69 ára gamal.

Omma doyði fyrst í 20-unum. Eg minnist, at eg var einaferð á Nesi við mammu. Tá lá hon í seingini. Hon hevur nokk verið um tey 80.